## UTTAN ÚR HEIMI

### Kann koma fyri norskan rætt

Myndugleikarnir í Fraklandi og Noregi eru samdir um, at málið um tangaskipið norska “Bow Eagle, sum sigldi ein franskan trolara niður mánanáttina, kann kom fyri rættin í Noregi. Norska reiðaríið viðgekk mikudagin, at tað var tangaskipið, sum hevði siglt á tann franska trolaran.

Samstundis hevur reiðaríið sagt, at tað er skelkað av, at »Bow Eagle« ikki steðgaði fyri at hjálpa teimum neyðstøddu fronsku fiskimonnunum. Tveir menn av Filipsoyggjunum høvdu vakt á brúnni á tangaskipinum, tá samanstoyturin var, men teir gjørdu onga roynd at steðga skipinum ella at hjálpa manningini á franska trolaranum.

Kemur norska manningin fyri rættin í Fraklandi, verða teir helst ákærdir fyri óviljað manndráp, og tað kunnu teir fáa upp í fimm ára fongsul fyri. Franskir fiskimenn eru í øðini um framferðina hjá norska skipinum, og teir krevja, at manningin fær harða revsing.

### Bush ein annar Churchill

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, heldur, at George W. Bush, forseti eigur at verða mettur javnt við gamla bretska leiðaran Winston Churshill, sum ávaraði heimin ímóti Adolfi Hitler í árunum undan seinna heimsbardaga. Hóast hann ikki nevndi irakska leiðaran Saddam Hussein, er eingin ivi um, at hann í hesum føri ímyndaði sær Hitler sum ein nútíðar Saddam.

Í einari røðu á einari herstøð í Kalifornia viðgekk Rumsfeld, at amerikanska ætlanin at leypa á Irak fær ikki ta stóru undirtøkuna uttanlands, men hann segði seg vera sannførdan um, at amerikanska ætlanin er tann rætta, og at umheimurin fer at stuðla USA, tá álopið verður sett í verk.

-Tá Týskland leyp á eitt land fyri og annað eftir, søgdu fólk, at kanska hevði Churshill havt rætt alla tíðina. Kanska hevði tann einsamalla ávarandi røddin havt rætt, segði Rumsfeld og sipaði við hesum til ávaringarnar hjá Bush ímóti Irak.

### Tingingar útsettar

Tingingarnar millum Norður- og Suðurkorea um at knýta vega- og jarnbreytakervini í teimum báðum londunum saman eru útsettar. Sum skilst eru londini ikki ósamd um sjálva ætlanina, men ósemja er um, hvussu tingingarnar skulu skipast. Embætismenn royna av øllum alvi at fáa rudda forðingarnar av vegnum.

Í gjár fóru umboð úr báðum londunum undir aðrar tingingar, sum skulu økja handilssamstarvið um markið.

### USA aftur í buktini

Fleiri lond royna at fá aamerikansku umboðini á ST-ráðstevnuni um burðardygga menning at taka undir við teimum samtyktum, sum hini londini kunnu koma ásamt um, men fyribils bendir alt á, at USA fer at atkvøða ímóti.

Norski umhvørvismálaráðharrin, Børge Brende, hevði mikudagin fund við amerikanska varauttanríkisráðharran Paulu Dobrianski í Johannesburg. Aftan á fundin segði norski ráðharrin, at hann hevði roynt at sannføra amerikanska vararáðharran um, at tað hvílir ein stór ábyrgd á amerikansku stjórnini.

Sjálvbodnu felagskapirnir, sum hava sent umboð til Johannesburg, hava lítið álit á, at USA fer at broyta støðu. Teir vænta tvørturímóti, at USA fer at royna at leita sær stuðul úr Kanada og Avstralia til at fella tað, sum hini londini semjast um.

# Vænta yvirgangsatsóknir 11. september

**Myndugleikarnir í Pakistan siga seg hava fingið álítandi ábendingar um, at yvirgangsmenn fyrireika atsóknir á ársdegnum fyri atsóknirnar í USA í fjør.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Pakistansku myndugleikarnir bera ótta fyri, at yvirgangsmenn fara at skipa fyri atsóknum tann 11. september, tá eitt ár er liðið síðani atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon.

Stjórin í pakistansku fregnartænastuni, generalurin Salahuddin Satti, sigur, at eftir álítandi upplýsingum, sum fregnartænastan hevur fingið fatur á, ætla yvirgangsmenn at søkja at pakistanskum og útlendskum stovnum og felagsskapum, politiskum leiðarum, og herstøðum og kirkjum í Pakistan.

-Vit hava álítandi fráboðanir um, at yvirgangsmenn ætla at seta álop í verk tann 11. september, og tí hava vit givið øllum okkara myndugleikum boð um at vera á varðhaldi, sigur generalurin.

Pakistan átti ein týðandi lut í amerikanska álopinum á Afghanistan seinasta heyst, og seinastu mánaðarnar hava víðgongdir felagsskapir skipað fyri fleiri blóðugum atsóknum í Pakistan. Álopini hava m. a. verið vend ímóti útlendingum og kristnum í Pakistan.

Í mai doyðu ellivu franskir verkfrøðingar í einari sjálvmorðsatsókn í Karachi, í juni drap ein bilbumba tólv pakistanar, og fyrr í hesum mánaðinum doyðu ellivu fólk í tveimum atsóknum at einum kristnum sjúkrahúsi og einum kristnum trúboðaraskúla í Karachi.

# Bin Laden ríður um náttina

**Servandu amerikansku herdeildirnar í Afghanistan ivast nú ikki í, at Osama bin Laden er á lívi, og at hann heldur amerikanararnar fyri gjøldur**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen*

Leiðslan hjá teimum servandu amerikansku hermonnunum í Afghanistan kennir seg fullvísa í, at Osama bin Laden er framvegis á lívi. Leisðaln sigur seg eisini vera vísa í, at bin Laden fjalir seg við markið millum Afghanistan og Pakistan, men at hann flytir seg alla tíðina. Hildið verður, at bin Laden er á rossabaki, tá hann ferðast, og at hann ríður um náttina.

New York Times skrivar frá keldum í amerikansku fregnartænastuni CIA, at bæði bin Laden og næsti maður hansara, Ayman al-Zawahiri, eru á marknaleiðini millum Afghanistan og Pakistan, og at teir skifta bústað alla tíðina, so amerikansku hermenninir skulu ikki finna teir. Sagt verður, at teir ferðast bara um náttina og í vánaligum sýni, og tí hevur tað ikki eydnast teimum framkomnu amerikansku leitiskipanunum at finna teir, skrivar New York Times.

Tíðindini um at bin Laden ferðast næstan ótarnaður í teirri sera illgongdu marknaleiðini eru ikki nýggj, men hetta er fyrstu ferð, at ein so týðandi fjølmiðil sum New York Times ber tey.

Osama bin Laden hevur annars ikki givið nakað lívstekin frá sær síðani í desember í fjør, tá amerikanarar hoyrdu hann í Tora Bora-fjøllunum tætt við pakistanska markið.



*Sjálvt heimsins mest framkomna útgerð kann ikki finna bin Laden, sum ferðast á rossabaki í fjøllunum í Afghanistan*

# Málið er ikki Saddam Hussein, men oljan í Miðeystri

**Fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin, Ramsey Clark, sigur, at amerikanska tosið um Saddam Hussein og hópoyðingarvápn er bara eitt skálkaskjól fyri veruligu amerikansku ætlanini, sum er at fáa ræðið á oljuleiðunum í Miðeystri.**

USA-IRAK
*Árni Joensen*

Ramsey Clark, sum kom til Bagdad í gjár, vil vera við, at tað veruliga málið við amerikansku álopsætlanunum á Irak er at fáa ræðið á teimum ríku oljuleiðunum við Persaflógvan. Tosið um iraksk hópoyðingarvápn er ikki annað enn eitt skjálkaskjól, segði hann.

Fyrrverandi løgmálaráðharrin sigur, at USA er longu í kríggi við Irak hvønn einasta dag, og tað eigur tað vanliga amerikanska fólkið at skilja.

Ramsey Clark er í Irak saman við einar amerikanskari nevnd, sum hevur sett sær fyri at vísa á, hvussu nógv irakska fólkið líður undir teimum tiltøkum, sum ST setti í verk aftan á Flógvakríggið.




## Útvaldar vørur

NÓGV niðursettar

Eisini hava vit:



Andlits-og kropsrøkt

JUVENA



Samlistell



Brúkslist

eva solo

Vikublaðið 321000

Hjá Annu

Vágstún 2 • 700 Klaksvík • Tel 45 52 38 • hjáannu@post.olivant.fo




Vaktar- & Bjargingartænastan

## Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið

| | |
|---|---|
| Útnyrðingshornið | 60°45’ N og 005°24’ W |
| Útsynnigshornið | 60°24’ N og 005°24’ W |
| Lanndsynningshornið | 60°24’ N og 004°30’ W |
| Landnyringshornið | 60°45’ N og 004°30’ W |

Felagið Petroleum Geo-Services (PGS) kannar øki Kanninganar verða gjørdar vegna BP Exploration Operating Company

| | |
|---|---|
| Byrjað verður…………… | 29.08.2002 |
| Arbeiðið tekur væntandi… | 3 vikur |
| Skipanavn………………… | Falcon Explorer |
| Kallibókst/Heimstaður…… | P35Y7, Cypros |
| Fiskiveiðiumboð………… | Armann Lamhauge |

Samband fast við hjálparskipið »Acquarius« á VHF rás 16

Upplýsningar um dagligar seismiskar fráboðanir og ávaringar fáast á sjálvvirkandi telefonskipanini 35 13 05, ella á telefon 35 13 00

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 26. september 2002, kl. 10.45** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 41, Øravík.**

Ognin er eitt neyst í »Punthavnini«, til støddar 4 x 12 m. Eingin vegur er til neystið.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145, e-mail** ojk@advlaw.fo **(j. nr. 20020228)**, sum kann geva nærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur**

27. august 2002

MáF

## Sjónleikarastevna

í Mentanarhúsinum í Fuglafirði 20.-22. september 2002.

Tema: »At gera smáleikir burtur úr ævintýrum«.

Tilmelding hjá MÁF **í seinasta lagi 16. september 2002**.

**Tlf. 315624 · mail maf@maf.fo**

Visti tú ikki tað? Sosialurin